## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Lot til andøvsgul av vestri og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Fyrrapartin gul til stívt andøvsgul av suðri og yvirhøvur turt og sólglottar. Seinnapartin veksur hann vindin upp í ein strúk og regn. Seint um kvøldið støkkur hann vesturum til útsynning og ælingur. Hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 10 og 13 stig.

**Veðrið leygardagin og Ólavsøkuaftan:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi, sunnudagin minni vindur. Sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 12 og 16 stig.

# Tveyára gamal á »kettujakt«

BØRN
*Vilmund Jacobsen*

Tíðliga kom veiðihugurin.

Á myndini, vit síggja saman við hesum greinastubbanum, hevur tveyára gamli smádrongurin fingið um halan á nøkrum kettlingum, sum hava snýkt seg út um. Hann heldur fast, so her nyttar eingin góða »mamma«, fyrr enn málið er nátt; kettlingarnir skulu innaftur til kettuna, har teir eru tryggir og ikki ganga úti og vála_

Myndin er fitt, tí hetta er ikki vanligur máti at bera kettlingar. Men hvussu skuldi ein smádrongur av hesum árganginum borið teir øðrvísi; barnahendurnar eru smáar, og halin er jú góður at halda í, man hann halda!

Ketlingarnir eru fýra í tali; tann eini er gráur allur, sum hann er. Hann líkist einum »trølli«, men er ógvuliga fittur.




*Kettlingarnir skulu ikki ganga úti og vála; tað eru teir ov smáir til, mann lítli Kristian halda*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

## Kettlingunum vantar eitt heim

Kettlingarnir á myndini leita sær í løtuni eftir nýggjum heimi,.

Ynskir onkur sær ein kettling, kann ringjast á Sosialin í Eysturoy, tlf. 447820 ella á fartlf. 225429.

Enn hava teir allir hala; hann hevur lítli Kristian ikki slitið úr teimum, og enn eru teir allir á lívi.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 14 |
| Nuuk | 5 |
| Qaqortoq | 7 |
| Ammassalik | 8 |
| Saint John's | 21 |
| Halifax | 16 |
| Reykjavík | 10 |
| Seyðisfjørður | 9 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 17 |
| London | 20 |
| Tromsø | 12 |
| Bergen | 13 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 22 |
| Keypmannah. | 14 |
| Helsinki | 20 |
| Moskva | 31 |
| Berlin | 13 |
| Warzawa | 21 |
| Kiev | 17 |
| Bukarest | 24 |
| Paris | 22 |
| Madrid | 24 |
| Róm | 29 |
| Malorca | 32 |
| Athen | 33 |
| Malta | 30 |
| Tunis | 40 |
| Beijing | 31 |
| New Dehli | 35 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 16 |
| New York | 31 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 18 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 31 |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 14 |

### LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 1002 hPa yvir Skotlandi fer eystureftir. Eitt annað lágtrýst, 1002 hPa við Ísland grynnist.




**Í dag:**
Lágtrýstið sunnan fyri Hvarvið fer eystureftir og brúgvalagið haðani verður við Føroyar hósdagin.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 22/07 kl. 06[00]– 23/07 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 11,1°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 22/07 kl. 06[00]– 23/07 kl. 06[00]
Avfallið higartil í juli: 18,6 mm

TURRIKLÆÐI
HÚGVUR
T-SHIRT
KEPPAR
og FLØGG



12. MAÐUR
Tlf. 213212

www.sosialurin.fo

## VESTFALLSKYRRINDI

24. juli: Full sól
30. juli: Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2002

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 24. juli | 07.34 | 19.58 | 06.34 | 18.58 | 06.49 | 19.13 | 09.34 | 21.58 | 10.34 | 22.58 | 05.49 | 18.13 | 04.49 | 17.13 | 07.49 | 20.13 | 08.49 | 21.13 | 07.19 | 19.43 | 08.34 | 20.58 |
| 25. juli | 08.23 | 20.46 | 07.23 | 19.46 | 07.38 | 20.01 | 10.23 | 22.46 | 11.23 | 23.46 | 06.38 | 19.01 | 05.38 | 18.01 | 08.38 | 21.01 | 09.38 | 22.01 | 08.08 | 20.31 | 09.23 | 21.46 |
| 26. juli | 09.09 | 21.31 | 08.09 | 20.31 | 08.24 | 20.46 | 11.09 | 23.31 | — | 12.09 | 07.24 | 19.46 | 06.24 | 18.46 | 09.24 | 21.46 | 10.24 | 22.46 | 08.54 | 21.16 | 10.09 | 22.31 |
| 27. juli | 09.53 | 22.13 | 08.53 | 21.13 | 09.08 | 21.28 | 11.53 | — | 00.31 | 12.53 | 08.08 | 20.28 | 07.08 | 19.28 | 10.08 | 22.28 | 11.08 | 23.28 | 09.38 | 21.58 | 10.53 | 23.13 |
| 28. juli | 10.33 | 22.53 | 09.33 | 21.53 | 09.48 | 22.08 | 00.13 | 12.33 | 01.13 | 13.33 | 08.48 | 21.08 | 07.48 | 20.08 | 10.48 | 23.08 | 11.48 | — | 10.18 | 22.38 | 11.33 | 23.53 |

5 707265 100036 >